## Um okkum

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark er ein sjálvsognarstovnur.

Í Ráðgevingini arbeiða royndir sosialráðgevarar, og okkara virksemi byggir á høgt fakligt støði.

Okkara royndir og vitan innan tey ymisku økini er okkara styrki, og vit veita eina fyribyrgjandi og heilsufremjandi heildarráðgeving innan sosiala øki, ið ikki fæst aðrastaðni.

Ráðgevingin veitir ráðgeving og vegleiðing í teimum spurningum og trupulleikum tú/tit hava og virkar sum sambindingarlið millum teg, myndugleikar og stovnar.

Tú/tit kunnu venda tær/tykkum anonymt til okkara, og eingin skráseting fer fram. Vit hava tagnarskyldu.

Ráðgevingin er ókeypis og vit veita ikki peningaligan stuðul.


**Ráðgevingin**
**fyri føroyingar í Danmark**
Vesterbrogade 17 A
1620 København V

Tlf. + 45 33 23 99 80
Fax. + 45 33 23 92 34

**radgevingin@radgevingin.dk**
**www.radgevingin.dk**


**Avgreiðslutíð**

| | |
|---|---|
| Mánadag | 11.30 – 15.30 |
| Týsdag | 11.30 – 15.30 |
| Mikudag | 14.00 – 18.00 |
| Hósdag | 11.30 – 15.30 |

2015

# Ráðgevingin

fyri føroyingar í Danmark

Ráðgeving og vegleiðing

# Endamál

- at veita føroyingum í Danmark hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum
- at reka upplýsandi arbeiði á nevndu økjum mótvegis einstaklingum, myndugleikum og stovnum her og heima
- at virka sum millumlið millum føroyingar í Danmark og myndugleikar og stovnar her og heima innan nevndu økir.

Vit kunnu upplýsa um reglur og lóggávu, hjálpa við at samskipa og raðfesta, vísa á aðrar myndugleikar, stovnar og serfrøðingar.

# Lesandi

Vit kunnu vegleiða um:

- SU, hvussu nógv kanst tú forvinna
- Eyka SU til einligar uppihaldarar
- Børnetilskud til lesandi
- Ferðaískoyti
- Føroyafrádrátt
- Varðveitan av skattskyldu í Føroyum

# Flyting

Tá tú flytir millum Føroyar og Danmark, eru nógvir spurningar, sum stinga seg upp, tí lóggávan er ymisk.

Flytir tú til Danmarkar/Føroyar, kunnu vit vegleiða um:

- Flyting
- Persónsnummar
- Sjúkratrygging/Heilsutrygd
- Bústaðarviðurskifti
- Boligsikring
- ALS/A-kassa
- Hernaðarskyldu
- Flyting av bili
- Pensjón
- Sjúkradagpening
- Barsil
- Skatt
- Frítíðarløn
- Eftirløn

# Børn

Vit kunnu vegleiða um:

- Børnefamilieydelse
- Børnetilskud
- Børnebidrag
- Barnaansing
- Barnsburðarfarloyvi.

# Føroyskir sjúklingar

Sjúka kann elva til ótryggleika og fáa sosialar avleiðingar. Okkara vitan og royndir vísa, at umráðandi er at avdúka trupulleikar og tørv so tíðliga sum møguligt, soleiðis at neyðug hjálp kann setast í verk.

Vit ráðgeva og vegleiða føroyskar sjúklingar og teirra avvarðandi í sosialum viðurskiftum

Ein sosialráðgevi frá Ráðgevingini er at hitta á Sjúklingahotellinum Tórshavn hvønn týsdag millum 10.00 – 15.30.

Tit eru eisini vælkomin at venda tykkum til skrivstovuna hjá Ráðgevingini í Føroyahúsinum.

Vit kunnu eisini koma á sjúkrahúsið til innlagdar sjúklingar.

Vit kunnu:

- Ráðgeva og vegleiða í sosialum og persónligum spurningum
- Upplýsa um rættindi
- Hjálpa við umsóknum
- Virka sum sambindingarlið millum teg, myndugleikar og stovnar.
- Stuðla við samrøðu.